tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Aki Bertholdsen, Turid Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eydun Klakstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Skattatrýst og tænastustøði

Oddagrein

SÍÐANI hetta landsstýrið tók við hava vit sæð, hvussu veruligur fólkaflokspolitikkur er, tá hann sleppur at folda seg út uttan forðingar av nøkrum slag. Tað er ein óreingilig sannroynd, at landsstýrið rekur borgarligan fólkaflokspolitikk, og at Fólkaflokkurin miðvíst brúkar fullveldisstrembanina hjá Tjóðveldisflokkinum til at reka sín borgarliga politikk. At fíggjarmálaráðharrin í mongum gongur inn fyri borgarligum fólkaflokspolitikki er neyvan heldur nakað dulsmál longur. Málið hjá Fólkaflokkinum og harvið landsstýrinum er at lækka skattin, at privatisera, at skerja ella minka játtaninar til almennar tænastustovnar fyri bert at nevna nakað. Samtíðis verður kravt, at tænastustøðið hjá somu almennu tænastustovnum skal vera tað sama ella helst betur. At Tjóðveldisflokkurin er farin uppá vognin hjá Fólkaflokkinum síggja vit best í sambandi við játtaninar á fíggjarlógini til Strandferðsluna og sjúkrahúsøkið. Hetta hendir um somu tíð, sum metstórt yvirskot er á fíggjarlógini.

TAÐ vit hava frætt er, at hetta yvirskotið skal brúkast til at konsolidera við til verri tíðir. Hetta ljóðar skilagott, men hetta er ikki veruliga orsøkin. Hon er fullveldið. Fíggjarmálaráðharrin og floksfelagar hansara í Tinganesi vilja - og tað eru teir eisini noyddir til - vísa í verki, at vit eru før fyri at klára okkum sjálvi búskaparliga, og tað kann jú bert gerast, um vit vísa sparsemi og hóvsemi og hava stór yvirskot á fíggjarlógini, sum væl einaferð skulu koma ístaðin fyri blokkin. Slíkt er logiskt og solangt kann man fylgja teimum. Men so mugu teir eisini viðganga yvirfyri Føroya fólki, at politikkurin er at spenna lívreimina inn bæði tá tað viðvíkur tænastum, sum Strandferðslan og sjúkrahúsini skulu veita. Ístaðin fyri at viðganga hetta fara teir upp í kórið hjá teimum borgarligu og tosa um privatisering og um at krevja meira av hesum stovnum. Tað er ein áfrávíkilig sannroynd, at tað ber ikki til at varðveita eitt høgt tænastustøði, um tú ikki gevur stovnunum tú krevur hetta av neyðugu midlarnar. Júst støðan á Strandferðsluni og eitt nú Landssjúkrahúsinum eru talandi dømi um hesa øvugtu gongd. Vit síggja í dag, at eitt nú borgarligu flokkarnir í Danmark eru farnir at innsíggja, at tú kanst ikki seta skattin niður og samtíðis hava eitt vælútbygt heilsuverk. Teir góðtaka tí í dag eitt høgt skattatrýst, tí teir síggja, hvussu týdningarmikið tað er ma. at hava eitt vælvirkandi sjúkrahúsverk. Í hesum døgum hava føroyskir læknar gjørt vart við, at politiski myndugleikin í Føroyum virðir ikki tey krøv, sum í dag verða sett í Norðurlondum til eitt nýtímans sjúkrahúsverk. Vit eru rætt og slætt eftirbátur.

TJÓÐVELDISFLOKKURIN er størsti flokkur.Hann situr á pengakassanum. Hann hevur sett sær sum mál metstórt yvirskot á fíggjarlógini. Men tá má hann eisini taka sær høvuðsábyrgdina av, at so týðandi stovnar sum Strandferðslan og sjúkrahúsini ikki fáa veitt tær tænastur, sum flest allir samfelagsborgarar ynskja og krevja. Meðan Karsten Hansen situr á kassanum, ið er á tremur við pengum, so sindrast so stovnar sum Strandferðslan og Landssjúkrahúsið. Tað er ómoralskt at liggja oman á so nógvum pengum og lata alt syndrast rundan um seg. Endamálið er at geva borgarunum eina góða tænastu, men í dag fáa teir alt ov lítið fyri tann skatt teir gjalda. Skulu borgararnir velja millum skattalætta og góðar tænastur, so velja teir góðar tænastur. Tað vit síggja er ein kaldur og kyniskur politikkur, har fólkafloks- og tjóðveldismenn ganga hond í hond.

Sosialurin

Missurin av koyrikortinum størri revsing

– Tað er í mongum førum lemjandi at hava mist koyrikortið í drúgva tíð og forrent eisini, um tú kanska heilt ert givin at drekka og hevur broytt lívsstíl, sigur Dan R. Petersen m.a. í viðmerkingunum til uppskot, sum hann hevur lagt fram vegna Javnaðarflokkin

At missa koyrikortið er størri revsing, enn at skula inn at sita, heldur Javnaðarflokkurin

ÓLAVUR Í BEITI

Í viðmerkingunum til uppskotið um broyting í ferðslulógini, vísur Dan R. Petersen á, at eitt uppskot toluliga líkt hesum varð av Føroya Landsstýri lagt fyri tingið 30. mars 1993, men táverandi rættarnevnd kendi seg ikki sannførda um, at tað var rætta løtan at gera hesa lógarbroyting í Føroyum, og setti tí einki uppskot fram. Málið fall sostatt burtur.

Og í 98 legði landsstýrið uppskot fyri tingið um broyting í løgtingslóg um ferðslu, har talan var um fleiri týdningarmiklar broytingar í ferðslulógini, harímillum eisini uppskot um ásetingar um afturvegan av fররararættinum í førum, har viðkomandi hevði yvirhildið eina eftiransaða viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Men málið fall burtur, sbr. stýrisskipanarlógini, tí tað ikki var liðugt viðgjørt undan valinum.

– Hildið verður, at einki er til hindurs fyri at taka hesa einu lógarbroyting um afturútvegan av fররararættinum í ávísum førum til viðgerðar fyri seg. Ein orsøkin til, at tað verður gjørt, er, at henda broyting hevur virkað í Danmark í fleiri ár. Tað førir við sær, at maður/kona t.d. dømd í Føroyum, kunnu flyta til Danmarkar og fáa koyrikortið aftur eftir hálvari tíð, um tey lúka treytirnar. Heldur ikki er nøkur loyna, at tað eru nógv fólk í Føroyum, ið eru sera áhugað í hesum máli. Tað er í mongum førum lemjandi at hava mist koyrikortið í drúgva tíð og forrent eisini, um tú kanska heilt ert givin við at drekka og hevur broytt lívsstíl, sigur Dan R. Petersen í viðmerkingunum.

Riggar væl

Og víðari vísur hann á, at sum er, kanst tú í Føroyum, um tú ert dømdur at sita upp til 60 dagar vegna rúsdrekkakoyring, sleppa frá at sita, um tú í 1 ár hevur verið í einari eftiransandi viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Henda skipan, ið hevur virkað síðani 1992, tykist at rigga væl, men frá Kriminalforsorgini, ið umsitur hesa skipan, vita vit, at áhugin hevði verið munandi størri, um reglurnar um afturútvegan av fররararættinum eisini vóru galdandi í Føroyum.

– Skipanin um viðgerð fyri rúsdrekkakoyrarar í staðin fyri fangahús varð sett í verk í Danmark í 1990. Orsøkin var hon, at 2/3 av øllum rúsdrekkakoyrarum við fangahúsrevsing vórðu mettir at hava so stórar trupulleikar av rúsdrekka, at teimum torvaði viðgerð. Úrslitið var so væleydnað í Danmark, at gjørt var av í 1992 at geva møguleika fyri afturútvegan av koyrikortinum við somu treytum.

Føroyingar einki øðrvísi

Uppskotið fevnir sostatt um tey, ið hava mist koyrikortið millum 3 ár og med alla. Hesi fólk eru vandamikil fyri ferðslutrygdina. Vónin er, at viðgerð í staðin fyri fangahús og afturútvegan av koyrikortinum við ávísum treytum skal hava við sær færri endurtøkur av rúsdrekkakoyring hjá sama bilførara. Danmarks Statistik hevur eftirkannað hetta, og vísir kanningin, at broytingin er hagfrøðisliga týdningarmikil og ikki tilvildarlig. Talið av rúsdrekkakoyrarum er minkað sum heild, og talið av teimum, ið fáa afturstig, er munandi minkað.

– Tað er valla orsøk at halda, at føroyingar skuldu verið øðrvísi í so máta. Sostatt skuldi verið ferðslutrygdarligur fongur í hesi skipan umframt gagn fyri rússdrekkadømda føraran, avvarðandi hansara og arbeiðspláss. Heldur ikki er tað uttan týdning fyri samfelagið, at fangahúsplássini verða spard, tí fólk velja heldur at fara í viðgerð enn at fara inn at sita og so kanska eisini at fáa koyrikortið aftur fyri tíðina. Fyri mong er missurin av koyrikortinum størri revsing enn tað at fara inn at sita.

Siðvenja

Nevndin, ið gjørdi lógaruppskotið, ið lagt varð fram í mars 1998, gjørdi í viðmerkingunum til lógina vart við, at hon var av tí fatan, at ásetingarnar í føroysku ferðslulógini so vítt gjørligt skuldu tilevnast í samsvari við tær samsvarandi ásetingarnar í dansku ferðslulógini.

– Við hesum kann siðvenja hjá danska Hægstaretti nýtast beinleiðis her, og so slepst eisini undan at byggja upp eina serliga føroyska siðvenju, sum hevði verið sera trupult fyri bæði dómstólarnar og ákæruvaldið. Ein harmonisering við danska ferðslulóggávu hevur harafturat tann ágóða við sær, at frádøming av fররararættinum sambært føroyskari ferðslulóg uttan himpr verður viðurkent av dansku myndugleikunum, sigur Dan R. Petersen í viðmerkingunum til uppskotið.

Sakførari viðger uppsøgnina

Verkfrøðingafelagið hevur sent málið um uppsøgnina av Jákupi Mørkøre til kanningar hjá sakførara

JOHN JOHANNESSEN

Tað er ikki vist, at uppsøgnin av Jákup Mørkøre verður løgd fyri rættin, hóast hann ikki góðtekur uppsøgnina.

Fakfelagið hjá fyrrverandi sjúkrahúsleiðaranum, Verkfrøðingafelagið, hevur sent málið til kanningar hjá sakførara. Men hóast tað verður prógvað, at uppsøgnin er órættvís, er ætlanin ikki at fara í rættin við málinum – í hvussu so er ikki beinan vegin.

Formaðurin í Verkfrøðingafelagnum, Suni Joensen, sigur, at eitt sakarmál í fyrsta umfari er útilokað í hesum málinum.

– Vísir tað seg, at uppsøgnin av Jákupi Mørkøre er órættvís, seta vit okkum í samband við Almanna- og Heilsumálastýrið og royna at fáa greiðu á viðurskiftunum, sigur Suni Joensen, sum tó ikki útilokar, at málið kann fara í rættin, um Almanna- og Heilsumálastýrið ikki verður at tosa við.

Formaðurin í Verkfrøðingafelagnum ger tó greitt, at hann ikki vil taka støðu til, um fyrrverandi sjúkrahúsleiðarin varð órættvíst viðfarin fyrr enn sakførarin er liðugur at kanna málið.

Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahúsleiðari

Tað verður hann helst einaferð í næstu viku.

Alandia avloysa Smyril

Gongst sum ætlað, verður tað 115 metra langa finska ferjan, Alandia, ið skal røkja Suðuroyarsiglingina meðan Smyril er í dokk

Alandia skal væntandi røkja Suðuroyarsiglingina ein góðan mánað, meðan Smyril er í dokk

Mynd: Eckerö Linjen

JOHN JOHANNESSEN

Tað verður helst tann 4.152 bruttoregistartons stóra finska ferjan, Alandia, ið skal røkja Suðuroyarsiglingina ein góðan mánað, meðan Smyril er í dokk.

Fólk frá Strandfaraskipum Landsins hava júst verið í Finnlandi og hugt eftir skipinum, og sigur Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á SL, at hetta er skipið, ið liggur fremst í huganum, verður peningur funnin at leiga avloysaraskip til Suðuroyarsiglingina, meðan Smyril er í dokk.

Tíðarskeiðið ikki avgjørt

Magnus Magnussen sigur, at tað enn ikki er gjørt av, hvat tíðarskeið, Alandia kemur at røkja Suðuroyarsiglingina. Hetta hongur saman við nær reiðariið, Eckerö Line, ið eigur Alandiu, vil leiga skipið út. Somuleiðis hongur hetta eisini saman við, nær pláss er fyri Smyrli í dokkini á Skála.

Tó vónar tekniski leiðarin, at Alandia verður sett inn í Suðuroyarsiglingina umleið fyrsta mars.

Farleiðin, finska skipið vanliga siglir, er millum Grisselhamn í Svoríki og Eckerö, stutt norðan fyri Mariehamn, á Álandi.

Størri enn Smyril

Avloysaraskipið til Suðuroyarsiglingina er størri enn Smyril. Alandia er 108,7 metrar long og 17,2 metrar breið, meðan Smyril 92,66 metrar langur og 16,7 metrar breiður.

Alandia er 4.152 bruttoregistartons, meðan Smyril einans er 2.430 bruttoregistartons.

Eisini tekur avloysaraskipið nógv fleiri ferðafólk enn Smyril. Ja, hon tekur enntá fleiri ferðafólk enn Norröna. Alandia tekur 1.320 ferðafólk, meðan Smyril tekur 800 ferðafólk og Norröna tekur 1.100.

Umborð á Alandiu er pláss fyri 220 persónbilum. Umborð á Smyrli er pláss fyri 100 persónbilum og umborð á Norrönu er pláss fyri 350 persónbilum.

Orsøkin til, at Alandia tekur nógv fleiri ferðafólk enn Smyril og eisini fleiri enn Norröna er, at hon er bygd sum dagferja, og hevur tískil ikki so nógvar koyggjur.

Hóast Alandia er størri enn Smyril og tekur fleiri ferðafólk enn hann, vinnur Smyril hana tó á einum øki. Hann siglir skjótari. Smyril kann nevniliga sigla við 19,6 míla ferð, meðan ferðin hjá Alandiu er 16,5 míl. Hetta kemur tó ikki at leingja munandi um siglingartíðina millum Suðuroynna og Havnina, tí Smyril siglir vanliga ikki við fullari ferð á hesi farleið.

Finsk-føroysk manning

Treytin fyri, at Strandfaraskip Landsins kunnu leiga finsku ferjuna er, at skiparin og ein partur av manningini vera finnar. Men tó verður meginparturin av manningini føroysk.

Áðrenn endalig avgerð verður tikin um at leiga Alandiu, eru ymiskir tekniskir smálutir, sum skulu kannast í Føroyum. Til dømis skal kannast, um ferjuskráarnir passa til portrini á Alandiu og ymiskt annað líknandi. Men hetta sær Magnus Magnussen, tekniski leiðarin á SL, ikki sum nakran stórvegis trupulleika, og væntar hann tískil, at tað fer at bera til at seta Alandiu inn í Suðuroyarsiglingina einaferð fyrst í mars.

Fakta um

	Smyril:	Alandia:	Norröna:
Byggiár:	Aalborg Værft 1969	Týskland 1972	Týskland 1973
BRT:	2.430	4.152	7.475
Long:	92,66 m	108,70 m	128,89 m
Breidd:	16,70 m	17,2 m	20,81 m
Ferð:	19,5 míl	16,5 míl	22 míl
Ferðafólk:	800	1.320	1.100
Bilar:	110	220	350

Heimabio
STATOIL
Nýggir filmar hvørja viku

THE MATRIX

LOKKEDUEN

NOTTING HILL

UNIVERSAL SOLDIER
Leiga videofilmar á hesum støðum:
Statoilstøðin í Gundadali tel. 314770
Statoilstøðin í Kollafirði tel. 421083
Statoilstøðin í Saltangará tel. 449133
Statoilstøðin í Klaksvík tel. 457353
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Leirvík tel. 443360
STATOIL
støðirnar kring landið